## VIÐMERKINGAR

# Grundlóg teirra veiku

**Jón Ellendersen**
*vegna Föroya fólk og tær almennu Föroyar*



1. Børn við DAMP, atferðartrupulleikum, vánaligum sosialum korum o.tl. eiga rættin til størri umsorgan enn "frísk" børn; tey eiga rættin til mannsømiligkor og rættin til, at teimum verður tryggjað eitt optimalt lív í Føroyum. Somuleiðis eiga tey rættin til, at føðilandið ikki vísir tey frá sær.

2. Menningartarnað, tey, ið hava DOWN syndrom e.tl. eiga rættin til optimala menning, góðar og tryggar møguleikar at luttaka í samfelagslívinum á jøvnum føti við øll onnur; tey eiga rættin at verða vird sum fullborin menniskju og sum heilir persónar; tey eiga rættin til somu búkor sum onnur og rættin til, at føðilandið gevur teimum tað í kompensasjón, sum tey ikki sjálvi eru før fyri at vinna sær.

3. Rørslutarnað eiga rættin til atkomu á øllum støðum á jøvnum føti við tey, íð einki rørslutarn hava; tey eiga rættin til fulla kompensasjón fyri rørlsutarnið, hetta við neyðugum hjálpartólum; tey eiga rættin til at luttaka á arbeiðsmarknaðinum á jøvnum føti við onnur og rættin til at fáa eins góða útbúgving og onnur eftir egnum ynski.

4. Sinnisveik /sinnissjúk eiga rættin til alla neyðuga hjálp, bæði medisinska og sosiala; tey eiga rættin til at verða vird á jøvnum føti við onnur, so veikleiki ella sjúka teirra ikki gerst ein foring fyri, at tey kenna seg sum fullgóð menniskju; tey eiga rættin til menning, útbúgving og eitt optimalt privatlív, har egin ynski verða sett hægri enn ynskini hjá stovni, sjúkrahúsi ella avvarðandi.

5. Heilaskadd eiga rættin til optimala afturvenjing, har alt verður sett inn á at afturvinna teimum tað lívið, skaðin hevur tikið frá teimum; tey eiga rættin til í mest møguligan mun at kunna venda aftur til tað arbeiðslív, tey høvdu áðrenn skaðan; tey eiga rættin til bústaðarmøguleikar, har íbúðin/ húsini verða innrættað soleiðis, at tey kunnu ferðast sum áður í mest møguligan mun; tey eiga rættin til at verða vird sum tey menniskju, tey vóru áðrenn skaðan.

6. Okkara eldru, hvørt tey eru óhjálpin vegna aldur, barndømi, Alzheimer ella aðra sjúku, eiga fullan rætt til eitt mannsømandi lív til seinasta andadrátt; tey eiga rættin til at veit leggja dent á at tey kunnu varveita fulla virðing fyri sær sjálvum og frá øðrum. Tey eiga undir ongum umstøðum at kenna, at samfelagið ikki longur hevur brúk fyri teimum, men ístaðin, at samfelagið alt virðir og gleðist um tað, tey hava lagt eftir seg. Tey eiga rættin til, at tey gomlu ikki verða mett sum ein byrði, men ístaðin sum ein gáva.

7. Annars eiga øll, sum vegna likamliga ella sálarliga sjúku ella á annan hátt, ikki longur megna at luttaka í samfelagslívinum — eisini sosialt, eiga rættin til, at mest møguligt verður gjørt fyri, at tey framvegis kunnu kenna seg sum fullgóðir borgarar, at tey enn hava sama virði sum áður; tey eiga rættin til, ikki at gerast einsamøll vegna sjúkuna og rættin til best møguliga viðgerð á einhvønn hátt.

8. Samfelagið, tvs. hin einstaki føroyingurin, løgtingi, landsstýri, heilsuverk og almannaverk og annars allir stovnar, ráð v.m., sum løgting og landsstýri vara av, hevur felags ábyrgd av, at grein 1 til og við 7 verða uppfyltar og fylgdar so langt til ber. Eru aðrar íløgur, sum ikki beinleiðis ávirka tað almennu vælferðina, og soleiðis eisini kann raka tey, ið eru nevnd í grein 1 til og við 7 ein forðing fyri, at grundlógin verður hildin, eiga hesar íløgur at víkja fyri íløgum, sum eru hesum (í grein 1-7) at frama.

# Opið bræv til Hans Paula Strøm, landsstýrismann, í sambandi við sparingar á Almannastovuni

**Nevndin í Sosialráðgevarafelag Føroya**
*Eliesar E. Jacobsen, formaður*

Seinastu 3 árini hevur Almannastovan staðiliga og við ágrýtni arbeitt við bygnaðarbroytingum á stovninum. Eitt av høvuðsendamálunum við at fremja hesar bygnaðarbroytingar hevur verið at kunna veita borgarum kring Føroya land eina betri tænastu.

Eftir mikið baks bæði á leiðslustøði, men ikki minst vegna starvsfólk á Almannastovuni, er Almannastovan í dag eftir tógvið stríð komin fram til eitt munandi betur tænastustøði til borgarin. Almannastovan hevur t.d. minkað um viðgerðartíðina á ymiskum umsóknum við einari helvt. Mannagongdir og framferðarhættir er broyttir í mun til ymiskar umsóknir fyri at kunna veita borgarum eina skjóta, góða og fyrisitingarliga rætta viðgerð. Upp- og afturlatingartíðir eru broyttar frá 4 tímum um dagin til 6 tímar um dagin. Somuleiðis er telefontíðin víðkað frá 4 tímum um dagin 4 dagar um vikuna til 6 tímar um dagin allar gerandisdagar í vikuni.

Samanumtikið kann sigast, at Almannastovan seinastu 3 árini hevur arbeitt við at geva borgaranum eina meira virðiliga viðferð við betri tænastustøði í hásæti vísandi til at viðskiftafólk, sum venda sær til Almannastovuna, aloftast eru í sosialari, heilsuligari, sálarligari ella fíggjarligari trongstøðu. Almannastovan kann sigast at hava samband við nærum hvørja familju í Føroyum. Tænasta verður veitt til fólkapensiónistar, fyritíðarpensiónistar, fólk, ið fáa veitingar sambært Dagpengalógini, fólk, ið fáa veitingar sambært Forsorgarlógini — vegna sjúku, arbeiðsloysi, endurbúgving, vantandi barnaansing o.s.fr., fólk við serligum tørvi/skerdum førleika í mun til at fóta sær á arbeiðsmarknaðinum vegna heilsuligar, sálarligar ella sosialar trupulleikar, fólk við børnum við sálarligum ella heilsuligum trupulleikum, fólk við børnum við sosialum trupulleikum, fólk, ið hava tørv á heilivági, kropsbornum hjálpitólum ella øðrum hjálpitólum so sum avlamisbilar, koyristólar o.s.fr..

Sostatt kann sigast, at tænastan á Almannastovuni fevnur um ein stóran skara av fólkum kring Føroya land. Tænastan umfatar ikki bert einstaklingar men eisini ymiskar samstarvspartar so sum Landssjúkrahúsið, Kriminalforsorgin, Serstovnadeildin, Sernámsdepilin, Stuðulsfólkaskipanin, Barnaverndir og kommunur kring landi, MBF, ALV, ymiskar arbeiðsgevarar kring landi o.s.fr.. Almannastovan hevur sostatt seinastu 3 árini arbeitt við at fáa eitt gott og gróðrarmikið samstarv umframt at veita eina góða tænastu til nevndu partar, sum í síðsta enda er komin borgarum til góðar.

Nú er borðið fram, at Almannastovan skal spara _ millión. Harumframt er borið fram, at tað heldur ikki í játtanini til Almannastovuni er tikin hædd fyri lønarhækkingum, soleiðis at samlaða sparingin í veruleikanum táttar um 1/2 millión.

Sosialráðgevarafelag Føroya fer hervið at spyrja seg fyri, hvussu hetta letur seg gera? Harumframt fer Sosialráðgevarafelag Føroya at spyrja seg fyri, um landsins politikkarir og Hans Pauli Støm vilja ella eru áhugaðir at varðveita eitt vælferðarsamfelag? Hesir spurningar verða bornir fram, tí Sosialráðgevarafelag Føroya dugir longu nú at hóma óhepnar avleiðingar av hesum sparingum.

Talið á starvsfólkum á Almannastovuni eftir okkara meting hevur longu áðrenn nevndu sparingar ikki verið hóskandi. Fleiri deildir hava t.d. arbeitt við ov fáum starvsfólkum, og onkur deild hevur verið uttan dagligan leiðara. Longu nú er sostatt stórt arbeiðspress og arbeiðsbyrða á Almannastovuni. Ilt er at spáa um, hvussu sparingarnar ítøkiligt verða framdar men vandi er fyri, at fólk verða søgd upp, einki nýtt fólk verður sett í starv, ongi fólk verða sett fyri onnur fólk, sum fara í farloyvir av ymiskum slagi ella siga upp o.a..

Úrskurðurin av hesum verður sjálvandi fleiri og størri arbeiðsuppgávur til færri starvsfólk á Almannastovuni. Vandin er sostatt, at tað tænastustøðið, sum Almannastovan hevur upparbeitt seinastu 3 árini, fer at versna. Longri viðgerðartíðir av ymiskum umsóknum, upp- og afturlatingaratíður styttri, telefontíðin styttri o.s.fr.. Hetta er als ikki ynskiligt, tí hetta fer at *ávirka viðskiftafólkini* á Almannastovuni tann negativa vegin, sum longu eru í neyð av einum ella øðrum slagi og hava tørv á skjótari, góðari, virðiligari og fyrisitingarligari rættari viðgerð/viðferð.

Viðskiftafólk á Almannastovuni hava nú í eina tíð vant seg við eitt hægri tænastustøði. Sosialráðgevarafelag Føroya ber ótta fyri, at tað, við ætlaðu sparingunum, er vandi fyri, at hóttandi atburður frá viðskiftafólkum, sum longu nú er vælkendur á Almannastovuni, fer at vinda uppá seg. Ágangur á starvsfólk vegna ringt tænastustøði er hvørki gott ella virðiligt fyri starvsfólk ella viðskiftafólk.

Sosialráðgevarafelag Føroya er væl vitandi um, líka sum landsins politikkarir skuldu verið, at gróðrarmikið arbeiði við menniskjum óloysandi hongur saman við góðum samstarvi, har gott tænastustøði er í hásæti. Fyriliggja ikki umstøður til tess, viðførður hetta ofta við sær strongd og útbrend starvsfólk, sum aftur viðførur ringt tænastustøði.

At enda skal viðmerkjast, at seinastu samgonguskjøl hava havt positivar orðingar um at fáa fólk við skerdum førleika aftur út á arbeiðsmarknaðin. Hetta førdi við sær, at størri innsatsur varð gjørdur innan hetta øki á Almannastovuni við fleiri starvsfólkum í 2000-2001. Vandi er fyri at ætlaðu sparingar á Almannastovuni føra við sær, at hetta øki verður raðfest lægri. Hetta er sera óheppi fyri allar føroyingar við skerdum arbeiðsførleika eisini sæð í mun til, at útlit eru fyri, at arbeiðsloysi er vaksandi í løtuni.

Sosialráðgevarafelag Føroya væntar hervið, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, fer at arbeiða fyri at hækka játtanina til Almannastovuna, so slík óheppin støða kann umgangast, og vit øll saman við viðskiftafólkunum á Almannastovuni kunnu varðveita vælferðarsamfelagið.

## Látupípurapp

*Lítli beiggi tú mást ikki gráta*

At gráta er ein táta, sum ongin orkar
fyri, tað skróðar og tað skramblar og eg
og abbi gerast svakir so klappa í og
hoyr so her hvat sosiala deild í síni
bestu meining hevur framleitt her til tín

*Her er nakað, eg skal geva tær*

Tí maðurin við hattinum hann snakkar
upp í saman og sigur at hann situr og
hugsar um títt lív og luskar, teskar,
mutlar í takt við tröll og tvætl, og
umber seg og sigur: Je viste ikkje av at
lítle beiggjon hevði eitt supurstort
problem

*Hygg, ein látupípa, ið kann láta*

Hon letur og hon skríggjar so omma
verður svök og endar sínar dagar hjá
Árna super Olsen og tú mín svaki
beiggi verður sendur har sum piparari
so lystiligt grör, til Karup við Atlantic

*Hana eg úr sóljukoppi skar*

Kaffikopp og sóljukopp er sikkurt heilt
tað sama, og endin verður altíð at tað
alt skal vaskast upp og tá er tú mín fitti
býtti beiggi tann sum standa skal við
tannbust og við svampi og tár í
eygunum og vaskar upp og niður til
látipípan tagnar sum ein druknað gomul
mús í fuckin´ Karup

So sit tú bara í Karup og blás í látupípu,
tí bara sápublöðruvals hon spælir fyri
tær, og brestir hvörja blöðru í eyguni
hjá tær, so tú kanst aftur gráta og hoyra
teirra svar

*Lítli beiggi tú mást ikki gráta, her er
nakað eg skal geva tær*

Ein einvegis til Karup, ein einvegis til
Karup, ein einvegis frá asosialu deild í
deiligu, herligu Havn

Og so var ikki meir, og so var ikki meir,
og hav tað nú so gott, og hav tað nú so
gott (10 ella 1.000 ferðir)
(og so alt tað heila umaftur)

***fyri a-sosialu deild og barna óverndina***

**Pegasus 2**



# Hermann á ákærubeinkin

**Føroya Fiskimannafelag kærir formannin Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, fyri løgmann, Jóannes Eidesgaard og Bárð Nielsen, landsstýrismannin í fíggjarmálum. Hermann tekur tað púra róligt, tí hann metir seg ikki hava gjørt nakað skeivt**

KÆRDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*





Hann hevur rættiliga verið í andglettinum seinastu vikurnar. Hermann Oskarsson, fornaðurin í Búskaparráðnum. Í fleiri lesarabrøvum hevur hann verður skýrdur fyri at renna politisk ørindi fyri Tjóðveldisflokkin.

Seinasta skotið eftir Hermanni eigur formaðurin í Fiskimannafelagnum, Óli Jacobsen, sum vegna fakfelagið ynskir eina kanning av leiklutinum hjá Hermanni Oskarsyni í samband við luttøkuna á fundinum hjá Norðuratlantsbólkinum um blokkstuðulin á Fólkatingi.

Í eini kæru til Jóannes Eidesgaard, løgmann og Bárð Nielsen, landsstýrismannin í fíggjarmálum, harmast Føroya Fiskimannafelag um útsagnirnar hjá Hermanni Oskarssyni og formanninum í fíggjarnevndini í Fólkatinginum, Kristian Thulesen Dahl, um skattafrádráttin hjá føroyskum og sjó- og fiskimonnum.

### Inn á sjálvræðið

Kæran hjá Føroya Fiskimannafelagnum snýr í stuttum seg um, at Hermann Oskarsson verður mettur at vera upprunin og orsøkin til ágangin frá dønum ímóti føroyskum fiskimonnum. Í blaðgrein í Berlingske Tidende, hevur Hermann sagt, at hann heldur ikki tað er rætt, at føroyingar halda á við at veita fiskimonnunum ein skattafrádrátt á 15 %..

Útsagnirnar hjá Hermanni fingu formannin í donsku fíggjarnevndini, Kristian Thulesen Dahl, at rakna við, og krevja, at danski blokkstuðulin skuldi endurmettur, tí tað kundi ikki verða rætt, at ein ávísur bólkur slapp at skúma róman av danska blokkstuðulinum.

Føroya Fiskimannafelag metir útsagnirnar hjá Hermanni at vera einsháttaðar, og eina vanvirðing av føroysku fiskimonnunum.

At danir ætla at blanda seg upp í eitt málsøki, sum føroyingar hava fullan raðisrætt yvir, heldur Fiskimannafelagið er ein álvarsom hóttan móti føroyska sjálvræðnum.

– Vit meta tað at vera sera álvarsligt, at ein týðandi almennur embætismaður alment á ein slíkan hátt beitir danskar leiðandi politikkarar eftir okkum við slíkum hóttanum, tá embætismaðurin ikki sjálvur fær føroyskar myndugleikar at "makka rætt". Vit meta tað at vera sera ivasamt, um ein slík mannagongd kann vera innanfyri hansara heimildir sum formaður í Búskaparráðnum, stendur skriva í kæruni hjá Fiskimannafelagnum.

Róligur

– Eg havi ikki tikið alt so nær fyrr, men seinastu vikurnar havi eg verið stoyttur av teimum ákærum, ið hava verið ímóti mær.

Hermann Oskarsson sigur seg kortini ikki bera stórvegis ótta fyri eini møguligari kanning av sínum leikluti á fundinum um blokkstuðulin. Hann metir seg ikki hava gjørt annað enn sína skyldu at greiða frá føroyskar tjóðarbúskapinum.

– Talan var um ein reint fakligan fyrilestur, sum ikki tók nøkur politisk fyrilit. Eg haldi meg ikki hava gjørt nakað, sigur formaðurin í Búskaparráðnum.

Hann greiðir frá, at tað altíð uppgávan hjá Búskaparráðnum at vera í andstøðu og vera kritiskur móti búskaparliga politikkinum hjá sitandi samgonguni. At ymisk floksumboð og fakfelg finnast at honum og politikkinum hjá Búskaparráðnum er ein einføld orsøk.

– Her er talan um ávísar áhugabólkar sum vilja verja nøkur ávís áhugamál, og tað eru vit bert noydd at taka við, sigur hann

### Betri tíð

Tá vit hittu løgmann, Jóannes Eidesgaard, á orði fyrrapartin mánamorgunin, hevði hann júst lisið ákæruna frá Fiskimannafelagnum.

– Eg og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mugu tosa nærri saman, áðrenn eg kann siga ítøkiligt um málið. Einasta, eg kann siga nú, er at vit taka kæruna í størstum álvara, og saman við Bárði og okkara embætisfólki fara vit at viðgera kæruna, áðrenn ein endaliga niðurstøða verður gjørd, sigur løgmaður í stuttari viðmerking.

# Hjúkla um konuna og abbabørnini

**Eyðkendi vinnulívsmaðurin og skjótt fyrrverandi stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju, Poul Mohr, hevur ikki gjørt sær stórvegis ætlanir um framtíðina, nú hann veitrar sínum lívverki farvæl. – Øll 12 abbabørnini eru ómetaliga góð við abban, og eg ætli mær at seta nógva tíð av til tey, sigur Poul Mohr**

FARVÆL SKIPASMIÐJAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*-Øll 12 abbabørnini eru ómetaliga góð við abban, og eg ætli mær at seta nógva tíð av til tey, sigur Poul Mohr*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Størsti vinnulívshandil í Føroyum. Fríggjadagin tveittu Mohrarnir á Tórshavnar Skipasmiðju eina bumbu, sum skelkaði føroyska vinnulívsheimin. Sterka og vælrikna fyritøkan millum Álagerð og Rættará hevur síðan 1936 verið ein týðandi partur av Mohr-familjuni, men fyrst í juli mánað verður hetta søguliga tíðarskeið av.

Tað var ein ikki sørt kensluborin Poul Mohr, sum greiddi fjølmiðlunum frá torføru avgerðini at selja Skipasmiðjuna til privata framtaksfelagið, Notio. – Kenslurnar máttu víkja fyri skilinum, var niðurstøðan hjá Poul Mohr um søluna av fyritøkuni, sum pápin, Kjartan Mohr, setti á stovn.

Seinastu 51 árini hevur Poul arbeitt á Tórshavnar Skipasmiðju, men í komandi mánaði leggur eyðkendi Skipasmiðjustjórin endaliga árarnir inn

### Til abbabørnini

– Hetta verður klassikarin. Eg fari at brúka tíðina til mína fittu konu og ikki minst abbabørnini. Øll 12 abbabørnini eru góð við abban, og eg ætli mær at seta nógva tíð av til tey, sigur Poul Mohr.

Hann sigur seg ikki hava gjørt stórvegis ætlanir um, hvat hann fer at takast við, nú hann um góðan mánaða veitrar sínum lívsverki farvæl.

– Eg eri blivin 75 ár, so hvørjar framtíðarætlanir skal eg gera mær ?. Tú fert so ikki at síggja meg í urtagarðinum. Slíkt tími eg ikki, og tí eri eg ómetaliga heppin at hava eina frálíka konu, sum tímir at gera hatta fyri meg. Eg ætli mær heldur ikki at fara ferðast, tí slíkt tími eg heldur ikki, greiðir Poul Mohr frá.

### Friðarligt vikuskiftið

– Sárið av at selja Skipasmiðjuna verður ongantíð grøtt.

Spurdur, um avgerðin at selja Tórshavnar Skipasmiðju er sodnað um vikuskiftið, svarar Poul Mohr, at tað kennist framvegis líka sárt sum fríggjadagin.

Hóast sølan av fyritøkuni til Notio tók flestar føroyingar á bóli, hevur Poul Mohr ikki merkt stórvegis hóvastak av søluni um vikuskiftið,

– Nei tað eru ikki nógv fólk, sum hava sett seg í samband við meg um vikuskiftið. Vikuskiftið hevur verið stak friðarligt, ja næstan friðarligari enn vanligt er, sigur Poul Mohr flennandi.

### Konan ávirkað

– Konan hevur verið ómetaliga tolin við mær. Hon verður helst líka í ørviti sum eg, nú eg fari at sleppa mær heim at mala um beinini á henni

Síðan 1953 hevur Poul Mohr arbeitt á Tórshavnar Skipasmiðju, og frá 1979 sum stjóri á fyritøkuni. Hann hevur halgað sítt lív til fyritøkuna, og sum stjóri á einari fyritøku, hugsar tú um fyritøkuna 24 tímar um døgni, sigur Poul Mohr.

– Hetta verður ein stór broyting hjá mær, men sanniliga eisini fyri konuna Avgerðin er tikin, og nú mugu vit bert fáa tað besta burturúr, sigur Poul Mohr at enda.